# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Georg Otthamar

**★ 7. juli 1955 – ✞ 5. januar 2010**



Týsdagin 5. januar andaðist Georg Otthamar løgreglumaður í Havn á Landssjúkrahúsinum, 54 ára gamal.

Georg var havnarmaður, sonur Judith og Arthur Otthamar. Hann var elstur av fimm systkjum.

Liðugur við skúlan var hann arbeiðsmaður í nøkur ár, til hann tann 1. mai 1978 gjørdist politistnæmingur. Eftir lokna útbúgving varð hann settur sum politistur í Havn í 1980.

Frá 1998 til 2000 var hann í starvi hjá danska ferðaliðinum. Hann arbeiddi annars tey flestu árini á kriminaldeildini hjá politinum.

Georg giftist Christu, dóttir Annbritt og Gunnar Hansen í Havn. Tey hava bæði verið virkin í samkomuni Ebenezer í m.a. sangkórinum. Christa og Georg fingu trý børn: Gunnbjørn, Anna Helena og Bogi.

*-red*

## Hjartans tøkk



Ein hjartans tøkk til tykkum øll, sum við gávum og vitjanum gleddu meg á 90 ára degnum 30. sept. 2009
Gott nýggjár.

**Heilsan**
**Hannemia Petersen**

Fyri 35 árum síðan:

## Maskinmeistaraprógv í 1975



Í januar 1975 tóku 18 maskinmeistarar prógv á Maskinskúlanum í Havn.

**Aftara rað, f.v.:** Jóhan P. Abrahamsen, Strendur, Súni Abrahamsen, Oyndarfjørður, Pætur Debes, Tórshavn, Regin Djurhuus, Hvítanes, Óli E. Erlingsson, Fámjin, Jóannes Eyðun Hansen, Funningur, Almfinn J. Jacobsen, Skálafjørður, Djon Djurhuus Jacobsen, Tórshavn, Jógvan H. Joensen, Miðvágur, og Karl Joensen, Syðrugøta.

**Fremra rað, f.v.:** Petur O. Larsen, Oyrarbakki, Jens O. Mikkelsen, Tórshavn, Mortan Mortensen, Tórshavn, Niels Jacob Olsen, Argir, Hjalmar N. Poulsen, Tórshavn, Ólavur Rubeksen, Tórshavn, Mannbjørn Vang, Miðvágur, og Hans G. Winthereig, Tórshavn.

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1975*

✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri bróðir okkara

**Óli Debess**
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 8. jan., 82 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin kl.14.00.

*Familjunnar vegna*
**Systkini**

**Dagurin**
11. januar. Hyginus, deyður umleið ár 142. Valdur pávi í 138, men varð fyribeindur, tá ið keisarin Antonius Pius forfylgdi teimum kristnu.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Merkisdagar

**80 ára føðingardagur**
Mikudagin 13. januar fyllir Andreas Debess (DIABA) 80 ár. Dagurin verður hildin á Tjarnargarði saman við familjuni.

**70 ára føðingardagur**
Hósdagin 14. januar verður Jafet Rasmussen í Søldarfirði 70 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Gullbrúdleyp**
12. januar hava hjúnini Magdalena og Jákup Martin Joensen í Oyndarfirði gullbrúlleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Oyndarfirði tann 16. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 16. jan kl. 13 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Jóhanna Dahl Sørensen Norðdepil og Rasmus Magnusson Innan Glyvur. Eftir vígsluna verður reception á Klaksvíkar Sjómansskúla frá kl 14-17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum í Árnafirði kl. 19.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!